# Máttloysi eyðkennir ung og avvarðandi

**Ongi tilboð eru til ung við serligum tørvi, sum fara úr fólkaskúlanum. Men okkurt er kanska við at henda. Myndugleikar viðurkenna trupulleikan, mannagongdir vera eftirhugdar og undirvísingartilboð vera fyrireikað**

TRIVNAÐARSTEVNA
*Ingi Rasmussen*

Máttloysi.

Við einum orði kundi støðan hjá ungum fólkum við serligum tørvi og teirra avvarðandi lýsast í Norðurlandahúsinum hósdagin, tá ráðstevnan um heilsu og trivnað hevði tey ungu til viðgerðar.

At tað eru nógv ung og børn, sum hava tað gott í Føroyum, kunnu vit skjótt staðfesta. Men tað eru nøkur, sum ikki hava tað lætt. Tey eru brekað, menningartarnað ella hava aðrar trupulleikar at dragast við, sum samfelagið illa megnar at taka sær av. Onkursvegna detta tey burturímillum. Tey koma hvørki undir at vera børn ella vaksin, og tilboð vanta til teirra.

Millum 600 og 700 ung fara úr fólkaskúlanum hvørt ár. Hvat verður av teimum við serligum tørvi, er tann stóri spurningurin. Tey trína út í eitt vakuum. Tað eru als ongi tilboð til tey við serligum tørvi eftir fólkaskúlan, staðfestir eitt nú Javni.




*Tað ræður um at viðurkenna, at vit hava nakrar álvarsligar trupulleikar at dragast við, annars koma vit ikki víðari. Allir myndugleikar eiga at innsíggja, at vit megna ikki at loysa trupulleikarnar við verandi tilboðum, sigur Finnur Helmsdal*

*Mynd: Jens K. Vang*

### Øðrvísi blóma

Vit koma ikki víðari við Róa, sigur Sigrun Wardum, ið tosar um sín menningartarnaða son.

Rói er 17 ár og í fagrasta blóma. Blóman er bara ikki soleiðis, sum foreldrini høvdu væntað. Hansara tørvur er júst tann sami sum hjá øðrum ungum: At ríva seg leysan. Men hann sleppur í ov lítlan mun at gerast sjálvstøðugur. Sigrun droymir um, at Rói kann koma á ein eftirskúla fyri menningartarnað, har hann eisini kann búgva. So høvdu verið aðrir persónar, ið kundu stimbrað hann, so hann kundi komið víðari.

Kanska sær tað ikki so svart út, tí Annlis Bjarkhamar, landsstýriskvinna við mentamálum, kundi í Norðurlandahúsinum hósdagin avdúka, at arbeitt verður við at fyrireika undirvísingartilboð til ung menningartarnað, og tey fyrstu kunnu byrja í august 2003.

### Teldan og lyftan

Samskiftið við myndugleikarnar var eisini uppi at venda í Norðurlandahúsinum. Tað var ikki fyri tað góða.

Sára Tummasardóttir, sum hevur verið sjúk av barna- og ungdómsliðagikt í 14 ár, greiddi frá ótolandi stríðnum við myndugleikarnar fyri at fáa hjálp. Bara tað at fáa brúkslutir, sum gera gerandisdagin lættari, er ein kampur. Heilt groteskt gjørdist tað, tá hon noyddist at bíða í fýra ár fyri at fáa eina lyftu. Tá lyftan endiliga kom, hevði hon skift báðar mjadnarnar og hevði tískil ikki sama tørv á lyftuni longur.

Tað tók eisini Sigrun fýra ár at fáa svar frá myndugleikunum uppá, um tey kundu fáa eina teldu til sonin at brúka. Tá svarið so endiliga kom, var tað noktandi, og lærarin, ið hevði vakt áhugan hjá Róa fyri telduni, var givin.

Umsóknir, pappírsarbeiði og samskiftið er ein ótolandi partur av lívinum hjá teimum við serligum tørvi. Myndugleikarnir taka ikki støði í fólkum men í stirvnum mannagongdum, var niðurstøðan.

Petra Johnsdóttir Joensen, stjóri á Almannastovuni, tók atfinningarnar til sín og ásannaði, at langa svartíðin í almennu forsorgini er ikki nøktandi.

– Í nøkrum førum eru mannagongdirnar í lagi og í øðrum ikki. Hetta er eitt øki, sum vit leggja stóran dent á at bøta um og mugu menna. Vit hava sett okkum nøkur mál, sum vit ætla at røkka.

### Eitt stig fram

Nógv føgur orð vóru søgd í Norðurlandahúsinum: Øll hava rætt til arbeiði, øll hava rætt til bústað, øll hava rætt til útbúgving. Og so framvegis. Tað var, sum høvdu vit hoyrt alt fyrr.

Men kanska er komið eitt stig víðari kortini, tí fólk tykjast vera farin at viðurkenna, at øll í Føroyum hava ikki hesi rættindi. Og tað er so eitt framstig, heldur Finnur Helmsdal, leiðari á Barnaheiminum.

– Eg loyvi mær at undrast á, hví hetta økið verður raðfest so lágt. Kanska lægst av øllum. Tað ræður um at viðurkenna, at vit hava nakrar álvarsligar trupulleikar at dragast við, annars koma vit ikki víðari. Allir myndugleikar eiga at innsíggja, at vit megna ikki at loysa trupulleikarnar við verandi tilboðum, sigur Finnur Helmsdal.

Tað tóktist, sum fólk og myndugleikar í Norðurlandahúsinum viðurkendu trupulleikan. So eru bara loysnirnar eftir.

# Krevja pápakvotu í barsilsskipan

**Hvørki Javnaðarflokkurin ella Tjóðveldisflokkurin taka undir við uppskotinum um at leingja barnsburðarfarloyvi. Annita á Fríðriksmørk og Kristian Magnussen krevja, at páparnir skulu taka sín part**

BARSILSFARLOYVI
*Ingi Rasmussen*

Páparnir skulu taka sín part av einum longdum barnsburðarfarloyvi.

Tað tykist vera støðan hjá bæði Javnaðarflokkinum og Tjóðveldisflokkinum á løgtingi. Ivasamt er sostatt, um Bjarni Djurholm fær undirtøku fyri uppskotinum um at leingja farloyvið úr 24 upp í 52 vikur í verandi líki. Bjarni Djurholm heldur nevniliga, at tað skal vera upp til familjuna sjálva at gera av, hvussu hon býtir barnsburðarfarloyvi sínámillum. Hesum sjónarmiði taka hvørki Javnstøðunevndin, Føroya Arbeiðsgevarafelag ella Starvsmannafelagið undir við. Tey vísa á, at støðan hjá kvinnuni á arbeiðsmarknaðinum viknar, um ongin pápakvota verður ásett.

Hesum taka Annita á Fríðriksmørk úr Tjóðveldisflokkinum og Kristian Magnussen úr Javnaðarflokkinum undir við.

### Pápakvota rættast

Sostatt er heldur ikki semja um málið innanhýsis í samgonguni.

– Eg kann ikki taka undir við uppskotinum, sum tað fyriliggur. Um farloyvið skal økjast við seks mánaðum, so skulu páparnir taka tríggjar mánaðir burturav. Um páparnir ikki fara í barsilsfarloyvi, skal teirra partur detta burtur, sigur Annita á Fríðriksmørk.

Javnaðarflokkurin fer helst at standa saman við Tjóðveldisflokkinum um eitt broytingaruppskot, tá lógaruppskotið fer í nevnd.

– Tað snýr seg um trivnaðin hjá allari familjuni, og tí má pápin sjálvandi taka sín part. Eg haldi tað vera rímiligt, at tað verður ásett, at pápin skal taka einar 12 til 13 vikur, um barsilsfarloyvið verður økt upp í eitt ár, sigur Kristian Magnussen.

### Hellir skeivt

Tey bæði vísa samstundis á, at uppskotið er eitt sosialt afturstig fyri barsilsskipanina. Verður tíðarskeiðið hækkað til eitt heilt ár uttan løn tað seinna hálvárið, so eru tað bara tey, sum frammanundan hava ráð, ið kunnu gera sær dælt av tí.

– Tey, sum ikki hava ráð at fara í farloyvi uttan løn, hava líka stóran ella størri tørv á at fáa endurgjald. Tí er tað helst rættari heldur at leingja barnsburðarfarloyvi stigvíst upp í eitt heilt ár, so at barnsburðarfarloyvið er eitt ár við fullari løn um fýra ár, sigur Kristian Magnussen.

Annita á Fríðriksmørk mælir til, at barsilsskipanin verður víðkað við einum mánaði við løn frá 1. januar 2003, og síðan leingja skipanina við einum mánaði árini frameftir, so at tað við árslok 2007 verður veitt fult lønarendurgjald fyri 12 mánaðir.

Uppskotið um at leingja barnsburðarfarloyvið kemur fyri løgtingið týsdagin.


